# Málsviðgeri til ALS

## Lýst verður við hesum eftir málsviðgera til Tryggingardeildina hjá Arbeiðsloysisskipanini

**Um Tryggingardeildina**
Tryggingardeildin umsitur vanligan arbeiðsloysisstuðul, Fiskavirkisskipanina, Farloyvisskipanina, arbeiðsloysistrygging fyri sjálvstøðug vinnurekandi og Barsilsskipanina.

Á Tryggingardeildini starvast 6 fólk.

**Uppgávur**
Uppgávurnar hjá málsviðgeranum verða:
- at taka sær av málsviðgerð og samrøðum í sambandi við tær uppgávur, ið deildin umsitur
- samrøður og samskifti annars við viðskiftafólk okkara
- at vera við til at tillaga og menna tænasturnar

**Førleiki**
Vit leita eftir einum persóni, sum er røkin og nærlagdur, tænastuhugaður, megnar at arbeiða undir trýsti og trívist við ymiskum og skiftandi arbeiðsuppgávum.

**Tað rætta starvsfólkið hevur:**
- skrivstovuútbúgving ella aðra hóskandi útbúgving
- evni at arbeiða skjótt, sjálvstøðugt og við støðugum evstamørkum
- evni at arbeiða við fleiri ymiskum uppgávum samstundis
- førleikar at arbeiða eftir lógarverki
- góð samstarvsevni
- lætt sinnalag
- evni at samskifta bæði í skrift og talu
- teldukunnleika á brúkarastigi

Viðkomandi arbeiðsroyndir eru ikki ein treyt, men kunnu vera ein fyrimunur.

**ALS bjóðar**
Talan er um eitt fast starv við góðum møguleikum fyri eftirútbúgving.

Løn sambært avtalu.

Starvið verður sett skjótast gjørligt.

**Umsókn**
Umsóknir, við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera ALS í hendi í seinasta lagi mánadagin 9. oktober 2006 kl. 12.00.

Umsóknir skulu sendast til ALS, Postsmoga 3022, 110 Tórshavn, ella til teldupost als@als.fo

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Heðin D. Poulsen, deildarleiðara, á tel. 349550 ella á als@als.fo

www.sansir.fo

ALS

ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 19 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður valt av Føroya Landsstýri.

Arbeiðsloysisskipanin • Postsmoga 3022
FO-110 Tórshavn • Tel 349550 • Fax 349551
als@als.fo • www.als.fo




## Uttan fiskiloyvir

Um hóskandi boð fæst, verður trolbáturin »Fiskaklettur« seldur uttan fiskiloyvir.

Báturin er í rímiligum standi og hevur góða útgerð á brúnni. Hevur Volvo Penta høvuðsmaskinu frá 1996.

Áhugaði verða biðin um at venda sær til Tor Shipping á telefon 35 85 31 ella á 21 85 32.

TOR SHIPPING

Sp/f Tor Shipping • Niels Finsensgøta 23 • P.O. Box 1252
FO-110 Tórshavn • tel. 35 85 31 • fax 35 85 30
www.torship.com • e-mail: torship@post.olivant.fo

# Maskinmeistari

Maskinmaður okkara hevur valt at taka av nýggjum avbjóðingum, og verður tí søkt eftir maskinmanni til P/F Salmon Proteins á Eiði.

**Arbeiðsuppgávur**
- At hava ábyrgd fyri dagliga rakstrinum, sum í høvuðsheitum er at ansa eftir dampketli, trýstkókara, reinsiskipan, pumpum og hartil hoyrandi útbúnaði.
- Viðlíkahald av rakstrartólum.

**Førleikakrøv**
- Maskinútbúgving.
- Ketilpassaraprógv er ein fyrimunur.
- Kunnleika til telduskipanir, serliga skipanir til stýring av rakstrartólum.

Tað er umráðandi, at tann, ið settur verður, kann arbeiða sjálvstøðugt og er førur fyri at leggja arbeiði til rættis sjálvur.

**Setanartreytir**
Løn og arbeiðstíð sambært avtalu.

**Umsókn**
Umsókn saman við upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera P/F Salmon Proteins, Postboks 9, 470 Eiði í hendi í seinasta lagi mánadagin tann 25. september 2006.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Annvør Jacobsen, stjóra, á tlf. 477500 ella 210270.

*P/F Salmon Proteins er eitt felag, ið savnar saman slógv frá alivinnuni í Føroyum og hagreiðir hetta á virkinum á Eiði. Á virkinum arbeiða í løtuni 2 fólk.*

**Almanna- og Heilsurøktarafelagið**
J. Paturssonargøta 24 · Postboks 350
110 Tórshavn – Føroyar (Faroe Islands)
Tlf. 315670 · Fax 315727
E-mail: ahf@post.olivant.fo

# Til allar limir
## í Almanna- og heilsurøktarafelagnum

Elisabeth Akursmørk heldur fyrilestur undir heitinum **finn tína styrki!** – og skapa tað lív tú ynskir tær – fyrilesturin verður ***hósdagin 21. septembur klokkan 16.00*** í hølum Starvsmannafelagsins, J. H. Schrøtersgøtu 9, Tórshavn. Fyrilesturin er ókeypis.

**Almanna- og heilsurøktarafelagið**

# GRUNDØKI
## í Klaksvík til sølu

Matr. nr. 1617c, Geilin 8 í Klaksvík, sum er eitt grundøki uppá 481m$^2$, til sølu um hóskandi boð fæst.

**Ábyrgd tlf. nr. 457791**

# Kiosk í Sandavági

Kiosk í leigaðum hølum til sølu.

**Ringið tlf. 333039 ella 533039**